# Norska oljusøgan á einum staði

Hevur ein áhuga í søguni um, hvussu Noreg gjørdist oljutjóð og hví júst Stavanger gjørdist norskur oljubýur, er Norsk Oljemuseum eina vitjan verd. Hetta er eitt nútíðar og ineraktivt savn á bryggjuni í Stavanger, har ein kann uppliva hvussu olja og gass vórðu skapað fyri milliónum av árum síðani. Ein partur av framsýningini er 3D-filmurin »Petropolis«, her ein fær eina sera góða mynd av, hvussu ein leitar eftir olju, hvussu hon verður framleidd og hvørjir møguleikar eru at brúka hana. Norska oljusøgan, sum byrjaði fyri 40 árum síðani, verður greidliga víst, eins og møguleiki er at sleppa »offshore« í ein mini-pall.






















